## Jóansøkubál í Funningsfirði

Aftur í ár verður bál og dansur á bryggjuni í Funningsfirði. Tiltakið síðsta summar eydnaðist sera væl, og nógv fólk stuttleikaðu sær á bryggjuni. Tí er avgjørt at endurtaka tiltakið, sum byrjar kl. 20:30 við at bálið verður tendrað. Kl. 21 bjóðar Kári P. Højgaard vælkomin og síðani verða grillirnar tendraðar. Endað verður kl. 23 við dansi, har Eager to Please spæla. Tvey stór telt verða eisini uppsett so um veðrið ikki verður til vildar, fáa fólk hugna sær í teltunum. Sum nakað nýtt, verður eisini tjaldingarpláss í bygdini.



## VOX 10 ár á baki

Í ár eru liðin 10 ár síðani kórið VOX byrjaði, og í hesum sambandi verður ein jubileumskonsert hildin í Norðurlandahúsinum 16. august. Kórleiðarin, Ásbjørn Berthelsen av Strondum sigur við heimasíðuna mission.fo, at tey hava boðið øllum teimum, sum hava sungið við kórinum hesi 10 árini at verða við á konsertini. Tey eru umleið 50 í tali. Konsertin í august verður skipað í trimum pørtum. Fyrst syngja tey, sum nú eru í kórinum. Síðani syngja fyrrverandi limir í kórinum, og at enda syngja øll saman.

# Hansens Pakkhús roynast sum spælistað

**Fyrsta almenna tiltakið í Hansens Pakkhúsi í Tórsgøtu í Havn, sum nú skal standa sína roynd sum spælistað, verður komandi mikukvøld klokkan 20, tá vísukvøld verður við Hanusi G. Johansen**

TÓNLEIKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*



*Soleiðis sær nýggja spælistaðið í Tórsgøtu í Havn út innan. Myndin er frá tiltaki har, sum býráðið skipaði fyri fyri nøkrum vikum síðani*

Alsamt fleiri ábendingar eru um, at Havnin langt um leingi fær tað spælistaðið, tónleikarar og tónleikaáhugað hava longst eftir í mong ár. Í øllum førum hevur Tórshavnar kommuna tikið avgerð um, at Hansens Pakkhús í Tórsgøtu næstu tveir mánaðirnar, til og við ólavsøku, skal roynast sum spælistað í orðsins breiðastu merking.

Fyri trimum vikum síðani var eitt tónleikatiltak fyri innbodnum í Hansens Pakkhúsi, og tað eydnaðist so mikið væl, at avgerð er tikin um at royna henda leistin í eina tíð.

– Endalig avgerð er tó ikki enn tikin um, hvussu húsið skal brúkast, men fremst í tonkunum er at brúka tað sum spælistað, sigur Heðin Mortensen, borgarstjóri.

Húsið vísir seg at vera vælegnað til tónleikatiltøk, tí í niðastu hæddini, sum ætlanin er at gera liðna fyrst, er pláss fyri 150 fólkum, so tað er eitt hóskandi konserthøli til tað mesta. Eisini eru borð, stólar og ljóðanlegg á staðnum, so klárt er hjá bæði bólkum og einstaklingum at halda seg framat.

Fyrsta almenna tiltakið verður mikukvøldið 18. juni klokkan 20, og tað verður Hanus G. Johansen, sum leggur fyri við einum vísukvøldi í Hansens Pakkhúsi. Atgongumerkini, sum kosta 100 krónur, kunnu keypast í Kunningarstovuni í Havn.

– Til og við ólavsøku fara vit at lata einstaklingum og bólkum húsi til tónleikaframførslur. Vit seta sum so eingi krøv til slag av tónleiki ella líknandi, men vilja geva øllum møguleika at royna seg, sigur Bogi Andreasen, leiðari á Margarinfabrikkini, sum fyribils tekur sær av at samskipa tiltøkini í Hansens Pakkhúsi.

Tað verður stórt sæð ókeypis at leiga húsið til tónleikatiltøk, og tey, sum spæla, fáa inntøkurnar av atgongumerkjunum.

– Vit hava staðfest, at húsið er rættiliga vælegnað sum spælistað, og nú skal tað so sleppa at standa sína roynd, sigur Bogi Andreasen, sum kann røkkast á fartelefon 213217 ella teldupostadressuni bogi@torshavn.fo.

Sum sagt, er enn eingin endalig avgerð tikin um, hvussu Hansens Pakkhús skal brúkast, men Heðin Mortensen, borgarstjóri, dylir ikki fyri, at tað mesta talar fyri, at hetta kann gerast tað spælistaðið, tónleikarar og tónleikaáhugað hava longst eftir í mong ár:

– Í fyrsta umfari verður henda royndin gjørd í niðastu hæddini, og vísir hetta seg at rigga væl, taka vit eina endaliga avgerð, og so verður farið í holt við at seta ta niðastu hæddina ordiliga í stand, so hon kann takast í brúk, áðrenn restin av húsinum verður gjørd, sigur Heðin Mortensen.

Hetta gera vit, tí um vit skuldu arbeitt eftir einari heildarætlan fyri alt húsið, hevði arbeiðið tikið nógv longri tíð. Vit ætla, at tað skal koma lív í húsið sum skjótast, og ikki fyrr enn avgerð er tikin um, hvussu niðasta hæddin skal brúkast, verður farið víðari við restini, sigur borgarstjórin.

# Norrøna í summarsigling í dag

**Sjey skúlaflokkar fóru í morgun til Skotlands við Norrønu, sum í dag fer undir uttanlandssiglingina**

FERÐING
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Á Smyril Line byrjar summarið veruliga, tá ið ferðaætlanin broytist frá várferðaætlanini til summarferðaætlanina. Størsta broyting er, at Norrøna frá í dag og fram til 27. august umframt at sigla til Danmarkar, Noregs, Føroyar og Ísland, eisini siglir til Skotlands.

Í dag fóru sjey skúlaflokkar til Skotlands, har tey skulu vera eina viku. Hesir skúlaflokkar telja tilsamans umleið 160 børn - úr Kommunuskúlanum, Eysturskúlanum, Vestmanna skúla, Kvívíkar skúla og Hósvíkar skúla.

- c hava so nógvir skúlaflokkar valt somu fráferð, og ongantíð hava so nógvir flokkar valt Skotland sum teirra ferðamál, sigur Jákup Sverri Kass, sølu- og marknaðarleiðari á Smyril Line.

Best umtókta ferðamálið hjá føroyingum er framvegis Danmark. Næst Danmark er Noreg – síðan kemur nú Skotland og síðan Ísland.

Teir vanligu sertúrarnir hjá Norrønu eru aftur á skránni í ár. 23. juni til 25. juni er Countrytúrurin á skránni og 25. august til 27. august er Harmonikutúrurin á skránni. Harumframt verður av fyrsta sinni skipað fyri Gartnaratúri til Skotlands. Hann verður frá 30. juni til 9. juli. Ferðaseðlasølan til føroyingar er í ár, á leið tann sama sum í 2007.

Jákup Sverri Kass sigur, at talan er um eina generella framgongd á ferðaseðlasøluni til meginlandið. Ein ávís afturgongd er at síggja í søluni av ferðaseðlum serliga úr Íslandi.

Vánaliga búðskaparstøðan í Íslandi kann vera ein av orsøkunum, heldur hann.

Vit eru annars spent upp á summarið og ynskja teimum, sum hava valt at keypa sær ferðaseðil við Norrønu í summar atfáa eina góða summarfrítíð uttanlands, sigur Jákup Sverri Kass.




*Ferðaklárir skúlanæmingr á veg til Skotlands*